

# HVALBA ER HIMMALIN FYRI MEG

TAÐ ER BARA SO **FANTASTISKT** AT BÚGVA HER Í **HVALBA**. HER ER FRIÐARLIGT, HER ER **TRYGT**, HER ERU SERA FITT FÓLK OG SERA **VAKURT**. EG VILDI IKKI BÚÐ NAKRA AÐRASTAÐNI ENN **HER**, SIGUR 35 ÁRA GAMLA **AROUSIAK BERBERIAN HAMMER**. **HON** ROKNAR SEG SUM **ARMENARA**, MEN ER NÚ GIFT **FØROYSKUM** SJÓMANNI. – MÆR DÁMAR VÆL AT FARA EIN TÚR TIL **HAVNAR**, MEN EG ERI ALTÍÐ GLAÐ FYRI AT KOMA **SUÐUR** AFTUR TIL FRIÐIN OG TAÐ **AVSTRESSAÐA** LÍVIÐ HER Í **HVALBA**



SAMRØÐA
Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

Tú sært tað beinanvegin á Arousiak at hon er ikki føroysk.

Men tað er munandi verri at hoyra, at hon eftir bert fimm árum hevur lært seg føroyska málið so skjótt og so væl. Enntá við suðuroyar-dialekt!

– Eg havi lært meg føroyskt, faktiskt bara við at lurta eftir, tá onnur tosaðu saman. Síðani havi eg spurt, hvat tað merkti og so líðandi eri eg komin á málið. Eg biði eisini altíð genturnar umborð á Smyrli um at rætta meg, um eg úttali okkurt galið. Og tað gera tær tíbetur eisini.

– Faktiskt vildi eg fegin lært meg at lesa og skriva føroyskt, soleiðis at eg eisini kann benda orðini rætt. Men eg veit ikki um nakað stað, har man kann gera tað, sigur Arousiak, sum umframt føroyskt eisini tosar enskt, armenskt, arabiskt og turkiskt. - Eg kundi væl hugsað mær at lært meg danskt eisini.

Hon og maðurin hava tey seinnu árini búð inni hjá verforeldrum hennara. Men í løtuni standa sethús teirra í gerð í Hvalba. Ætlanin er at flyta inn í tey í næsta mánaði.

– Tá fara vit at fáa umstøður at hava børn, sigur hon.

> Vit høvdu ikki siglt í meiri enn 15 minuttir, fyrrenn eg byrjaði at spýggja. Og eg spýði faktiskt allan vegin suður

## Face-to-face

Hóast mong munnu kenna brosandi andlit Arousiaks frá Smyrli, so er hon upprunaliga útbúgvin innan ferðavinnuna í Kuwait.

Ein stórur partur av gerandisdegi hennara var tá at sita frammanfyri telduni, meðan hon útinti arbeiði sítt innan ferðavinnuna. Og henni dámdi eisini sera væl at chatta við onnur fólk úr øðrum londum.

Ein summardag fyri júst sjey árum síðani kom hon á fyrsta sinni í samband við ein føroyskan chattara: Ein ungan sjómann úr Hvalba.

– Eg veit ikki, vit byrjaði at chatta saman, settu síðani myndatólið til og fingu soleiðis tosað betur og betur saman. Og ein dag avgjørdu vit at møtast face-to-face, sigur Arousiak við einum brosi. – Og hví ikki gera brúk av møguleika mínum at ferðast ókeypis kring heimin í arbeiðsørindum?

Avgjørt varð, at tey skuldu møtast í Keypmannahavn – hon skuldi flúgva úr Kuwait og hann úr Føroyum. Har hittust tey so, og høvdu eina góða og spennandi viku saman í danska høvuðsstaðnum.

– Tað bleiv bara til tað, at vit bæði blivu forelskað, sigur Arousiak og brosar enn einaferð um alt andlitið.

Men Arousiak vildi fegin sleppa at hitta hann eina ferð aftrat, og tey møttust tí aftur í Keypmannahavn, einaferð hann var heima av skipi.

– Eg veit ikki. Vit avgjørdu at fara eina túr til Føroyar, og mær dámdi beinanvegin so væl her, at eg fór ongatíð heimaftur.

## Álit á hvalbingi

Hetta var ein stór avgerð at taka fyri eina unga kvinnu, at flyta heilt úr Kuwait og beinleiðis til Suðuroyar. Og reaksjónirnar frá familjuni vóru eisini til at skilja.

Systir hennara var púrasta tikin av bóli av Arousiak: – Eg ringdi til ▶